# Klarinet-jól í Miðlahúsinum í Vágsbotni



Leygardagin tann 15. desember klokkan 15 til 18 spæla klariettir úr øllum landinum konsert í Miðlahúsinum í Vágsbotni Tá fara Klarinettir úr øllum landinum at spæla jólatónleik. Væleydnaða tiltakið fra desember 2006 verður endurtikið við hesari jóla – hugna – løtu í Miðlahúsinum. Næmingar úr Føroya Musikkskúla luttaka. Stór og smá spæla jólatónleik og annað gott bæði sum solistar og í stórum og smáum bólkum. Føroya Klarinettorkestur skipar fyri tiltakinum og eisini at okkurt gott og søtt fæst til matna henda dagin.

# Kavi tók bilførarar á bóli



*Tveir bilar vórðu vrak á Vatnavegi í Vágum fríggjadagin, men tíbetur hendi ongin fólkaskaði. Hetta er annar teirra og hann endaði á takiunum. Rodnund á Krelduni kom framvið og tók okkum hesa myndina*

**Hálkan seinnapartin fríggjadagin kom óvart á nakrar bilførarar**

Brádliga ákomin hálka seinnapartin fríggjadagin kom óvart á fleiri bilførarar.

Eisini hesin bilførarin varð tikin á bóli.

Hann kom koyrandi eftir Vatnavegi í Vágum seinnapartin fríggjhadagin, tá ið eitt kavaæl førdi til, at vegurin brádliga varð rættiliga hálur.

Tað endaði við, at hesin bilførarin misti tamarhaldið á bilinum og fór útav og endaði á takinum. Tíbetur var ongin fólkaskaði.

Eisini tíðliga í fríggjakvøldið fór ein annar bilur útav á sama vegastrekki og eisini í hesum føri er hálka givin upp sum orsøk til, at førarin tamarhaldið á bilinum. Men heldur ikki í hesum føri hendi mannskaði. Báðir bilarnir vórðu vrak.

Løgreglan sigur, at eisini aðrastaðni í landinum hendu óhapp í hálkuni, men talan var bara um smávegis skaðar á bilarnar.

**-áki-**

## Eyka-rokning fyri at rýma av staðnum

**Ein bilførari í Klaksvík rendi á um vikuskifti og rýmdi av staðnum, men tað hjálpti onki, tí hann varð feldur av seks tíma regluni**

Nú um vikuskiftið var eitt ferðsluóhapp í Klaksvík, har ein bilførari rendi á ein buss. Men hann hevði ikki reint mjøl í posanum, so hann stakk av.

Tað eydnaðist kortini løgregluni at finna bilin og kundi staðfesta, at skaðin, bilurin hevði, sampakkaði við tað, sum sást á bussinum.

Blóðroynd varð tikin av føraranum og hann er nú skuldsettur fyri at koyra við kenning.

Umframt revsingina fyri at koyra við ávirkaður, fær hann eina eyka rokning oman á fyri at rýma av staðnum.

Bilførari, sum er uppi í einum ferðsluóhapp skal ikki drekka í seks tímar eftir óhappið, tí so telur tað sum um at førarin var ávirkaður tá ið hann koyrdi. So hóast bilførarin í Klaksvík ikki varð tikin á staðnum, varð hann feldur av sekstíma regluni

Løgreglan sigur, at tað er javnan, at teir fáa tað frágreiðingina frá bilførarum, sum hava verið uppi í ferðsluóhappum, at teir drukku aftaná, men er tað styttri enn seks tímar aftaná, hjálpir ongin góða mamma.

**áki-**



## Skálabørn nummar tvey

**Leygardagin var finalan verið í kappingini í First Lego League í Herning í Danmark**

Leygardagurin var so dagurin komin, sum nøkur børn á Skála og fleiri vaksin við, hava bíðað eftir í langa tíð við stórum spenningi.

Hetta var nevniliga dagurin, tá ið finalan í stóru norðurlendsku kappingini, First Lego League skuldi vera.

Við í kappingini vóru 36 lið úr øllum norðurlondum, eisini Føroyum og Grønlandi.

Tey, sum umboðaðu Føroyar vóru Junior Kids av Skála og tað kann ikki sigast annað enn at tey stóðu seg rættiliga væl.

Endaliga úrslitið var, at Junior Kids á Skála endaðu sum nummar tvey. Tey fingu eisini annaðplássið í robottkappingini

Føroyingarnir eru avberavæl nøgdir við úrslitið og tað vera nøkur ovurfegin skálabørn, sum koma heim aftur úr Damark mánakvøldið.

**-áki-**

# Nógv smátt hjá løgregluni

**Løgreglan hevur havt nógv at gera um vikuskiftið, men talan hevur verið um smáttarí og eini følsk grindaboð**

Tað hevur ofta verið boð eftir løgregluni um vikuskiftið, men tað hevur ikki havt so nógv upp á seg.

Fríggjanáttina var innbrot í Statoil støðini í Kollafjarðardali, har sigarettir og annað, varð stolið.

Annars var eitt lítið ferðsluóhapp milum fjarða. Undir yvirháling feyk okkurt í framrútin, sum brotnaði.

Eitt annað ferðsluóhapp var í Havn, har ein bilførari ikki helt treytaleysa víkiskyldu og hann má nú upp til koyriroynd av nýggjum. Annars hava fleiri onnur ferðsluóhapp verið, men talan hevur bara verið um smávegis materiellan skaða.

Annars var ein bilur tikin í sikk-sakk koyring á Hvítanesvegnum og løgreglan fekk skjótt staðfest, at førarin var plakat, so hann varð tikin og missur koyrikortið.

Seinnapartin rann úr tonnunum á vágafólki, tá ið í boðað frá, at grind var í Vestmannasundi, beint við tunnilsmunnan í Vágatunlinum. Mentáið sýslumaðurin kom á staðið, var ongin grind, tí talan var bara um harðan streym, sum spældi fráboðaranum eitt puss.

Tvær ferðir varð løgreglan eisini boðsend til vertshús í Havnini, tí full fólk vórðu ólátað og annars eru fleiri fullir mans tiknir upp. Teir, sum hava verið so frægir, eru koyrdir heim, men hinir hava gist í kjallaranum á løgreglustøðini. Løgreglan hevur eisini verið heima hjá fólki, sum hava órógvað grannarnar við hørðum tónleiki, so tey fingu boð um at snara volumuknappin eitt sindur til vinstru, so tað fekst náttarfriður. Okkurt smávegis herverk var eisini.

**-áki-**